# Eitt betri lív

## Landsinnsavningin 2010
Leygardagin 22. maj



### Takk

Fyrst, takk til øll tykkum sum seinasta ár stuðlaðu arbeiðinum hjá Bláa Krossi, við at takað væl ímóti teimum mongu, sum gingu hurð til hurð við bússum tá landsinnsavningin var. Blái Krossur fekk tá kr. 530.000, sum hava avgerandi fíggjarligan týdning fyri arbeiðið.

### Eitt betri lív

- fyri tann, sum er bundin av rúsdrekka ella øðrum rúsandi
- fyri børn og ung har onkur, ið stendur teimum nær, hevur trupulleikar av rúsdrekka ella øðrum rúsandi
- børn, ung og foreldur teirra, soleiðis at tey verða tilvitað um ávirkanina, ið rúsdrekka og rúsevni hava
- eisini fyri pinkubørn í India, har mammur geva teimum rúsevni fyri sjálvar at kunnu fara til arbeiðis.

### Hetta fer peningurin til

- At skapa tilvitan millum børn, ung og foreldur teirra, er grundleggjandi fyribyrgingararbeiðið, sum Blái Krossur raðfestir frammalaga. Arbeiðið verður gjørt við at vitja skúlar og aðra staðir, har børn og ung samlast.
- Ætlanin at byggja nýtt viðgerðarheim heldur fram, soleiðis at besta hjálpin kann verða veitt teimum, sum eru bundin av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum.
- At skapað karmar fyri rúsfríum umhvørvi. Kafé Blákrossstovan er rúsfrítt dagtilhald í Tórshavn og í búfelagsskapum okkara bjóða vit bústað í tryggum karmum.
- Blái Krossur í Føroyum stuðlar systirfelagsskapi okkara í India í teirra verkætlan millum "opiumsbørn". Hetta eru børn, sum fáa rúsevni frá tey eru pinkubørn, soleiðis at tey eru í frið um dagin, meðan mamman ferð til arbeiðis. Blái Krossur vil geva hesum børnum og mammum teirra ein nýggjan møguleika.

### Aðrir møguleikar at stuðla

Tú kanst stuðla við at flyta eina upphædd á eina av konti okkara í peningastovunum:

| | |
|---|---|
| Eik Banki | 9181-495.393.4 |
| Føroya Banki | 6460-419.693.9 |
| Noroya Sparikassi | 9865-101.533.2 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870-405.626.5 |
| Postgiro | 9870-431.205.9 |

### Ver bússuberi!

Vit hava brúk fyri nógvum, ið vilja vera við at bera eina bússu 22. maj. Tekna teg sum bússubera á tel 470700 og hoyr nærri hvussu tú kanst hjálpa til.

Blái Krossur Føroya
Heiðavegur 32 · 600 Saltangará
Tel 470 700 · Faks 470 701
blakross@blakross.fo · **www.blakross.fo**

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

KREA · TEL 60 80 80

---

STARVSLÝSING

# Søluleiðari

*Til søludeild okkara søkja vit eftir nýggjum leiðara, sum kann virka fyri framhaldandi menning av inntøkugrundarlag okkara*

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku fjølmiðlunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Fremsta uppgávan hjá marknaðarleiðaranum er at hava ábyrgdina av allari vanligari lýsingaavgreiðslu og -samskipan. Í hesum er roknað dagliga samskipan av lýsingum, sum skulu í Sosialin og strategi fyri innheintan av nýggjum lýsingum, eins og tilrættisleggjan av arbeiðs- og mannagongdum á marknaðardeildini.

Eisini er tað uppgávan hjá leiðaranum at vera partur av arbeiðnum at menna fyritøkuna. Herundir at seta saman nýggj produkt á lýsingarøkinum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer á tel. 223369. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo.

**Umsóknarfreistin er 1. juni 2010.**

Skrivlig freist at senda til:

Sosialurin
Att.: Jonhard Hammer
Postsmoga 76
FO – 110 Tórshavn

Sosialurin hevur seinnu árini vaksið um virksemið frá at vera eitt tíðindablað, til at verða størsta fjølmiðlafyritøka í landinum. Konsernin umfatar Sosialin, Rás2 og tíðindaflutningin á heimasíðunum á portal.fo, sum er fremsta heimasíðan í Føroyum. Í dag starvast tilsamans um 40 starvsfólk í konsernini.

Tórsgøta 1
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Sosialurin